## Benzema vil skifta



20 ára gamli álopsspælarin hjá Lyon, Karim Benzema, ger nú greitt, at hann er sinnaður at skifta felag fyria t spæla í einari størri kapping enn tí fronsku. - Tað eru nógv áhugaverd feløg – Barcelona, Real Madrid, Manhester United og Milan. Tað eru alt feløg, sum tú droymir um at spæla fyri. Mær dámar væl Spania, men í Manchester og Milan kundi eg ment meg sera nógv, og eg vil gerast heimsins besti, sigur Benzema.

## Barcelona áhugað í ungum skota

Ein skoti í Barcelona. Tað er sum jól í lundatíð, men umboðsmaðurin hjá 17 ára gamla James McCarthy váttar, at spanska stórfelagið er áhugað í honum. McCarthy spælir fyri Hamilton, og har hevur hann staðið seg so væl, at feløg í Onglandi eru farin at hyggja nærri eftir honum. Og nú skal Barcelona eisini hava fingið eyguni á hann.

VÍF-StÍF 32-27 (17-12):

# Stórspæl í Vestmanna

**Í løtum sýndi VÍF veruligt meistaraspæl, men ferðin dalaði, og so var um reppið, at StÍF fekk togað seg aftur í dystin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Saman við liðfeløgunum sýndi Áki G. Olsen í løtum satt stórspæl, tá VÍF vann uppibornan sigur á StÍF sunnudagin*

*savnsmynd*

Eftir tapið móti H71 fyri viku síðani skuldu vestmenningar í gjár prógva, at teir hava styrkina, sum skal til, fyri at halda seg ovast á stigatalvuni.

Og tað gjørdu teir so ruddiliga í løtum av dystinum sunnudagin.

### Álopsmaskina

Strandingar hava ofta haft hepni við at dekka offensivt móti VÍF, soleiðis at sterku skjúttarnir ikki sleppa framat, og tað var eisini hesa uppskriftina, sum StÍF brúkti. Men hesa ferð virkaði hon so ikki í stórt meira enn eitt korter.

Tí tá VÍF veruliga fekk gongd á álopsmaskunina, beyð ikki bøtur. Sum so ofta fyrr, so var útgangsstøðið í verjuni, har teir fingu heilt gott tak á. Tað noyddi strandingar at skjóta í trýstum støðum, og tá tú hevur ein málverji við kastiteknikkinum hjá Eli Müller, so kostar hetta – og tað kostar nógv.

Skjótálopini og »løttu« málini, sum hesi góvu, gav eisini neyðuga yvirskotið til VÍF, sum næsta hálva tíman sat á øllum. Fleiri ferðir megnaðu teir við væl upplagda Áka G. Olsen sum orkesturleiðara at spæla strandaverjuna tunna við skjótum spæli, og so var lag á manni hjá Agnari Joensen, sum á strikuni fekk gott pláss frá offensivu verjuni.

### Mundu kannað sær bitan

Tíðliga í seinna hálvleiki bendi alt á ein veruligan stórsigur, men við 20 minuttum eftir fór ferðin nakað av heimaliðnum.

Helst høvdu teir longu kannað sær bitan tá, men StÍF noktaði at gevast. Spakuliga otaðu teir seg alt nærri, og tað var greitt, at frustratiónirnar gjørdust alt størri hjá VÍF. Dramatikkurin kom eisini í, tá Andre Danielsen fekk reytt fyri at steðga einum leysum Karl Johan Djurhuus, men Karl Johan vann sær eisini eitt reytt kort, tá hann ikki bara vildi liggja, og tá Marian Cirloganescu so eisini tók sær av brotskastinum, sum spurdist burturúr, kom veruligt lív í.

Avgerandi løtan kom tá, fimm minuttir vóru eftir at spæla. Fyrst hamraði Áki Olsen eitt vakurt skot inn av trimum metrum, og tá StÍF tveitti næsta álopið burtur, kundi Niels Andreasen taka luftina úr mótstøðuni, sum ongan tíð veruliga reistist eftir hetta. Bæði tí tíðin nú var um at renna undan, og helst eisini tí luftin var um at fara sama veg.

### Gull-kandidatar

Við sigrinum prógvaði VÍF, at teir avgjørt vilja halda fast um plássið í oddinum. Men meira týðandi, so borgaði spælið eisini fyri einum plássi á ovastu hill. Í øllum førum skulu mótstøðuliðini veruliga menna seg, skulu tey ikki fáa oyruni í maskinuna, um teir hvørja ferð fáa hesa at koyra á sama hátt.

StÍF misti hinvegin eitt fet í oddastríðnum, men nøkur vanlukka nýtist hetta ikki at vera. Í mun til onnur lið, so hevur StÍF eisini tveir sterkar trumfar, tá Sveinur og Leivur Justinussen aftur er tøkir, og megnar liðið at halda sambandið við oddin intakt, kunnu teir báðir væl fáa avgerandi leiklutir móti kappingarenda.

### FAKTA um dystin

**VÍF-StÍF 32-27 (17-12)**
**10 min:** 5-4
**20 min:** 11-8
**40 min:** 22-14
**50 min:** 26-21
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 13(5), Sámal Joensen 6, Áki Olsen 4, Niels Andreasen 3, Áki G. Olsen 3, Bjarti Hansen 1, Rúni Joensen 1, Karl Johan Djurhuus 1
**StÍF:** Alexandur Johansen 7, Kári Horn 4, Bárður Danielesen 3, Mortan Hansen 3, Borgar Danielsen 3, Andre Danielsen 3, Rúni Johansen 2, Bent Djurhuus 1, Jørmund Joensen 1
**Brotskøst:** VÍF 6, StÍF 3
**Útvísingar:** VÍF 5, StÍF 2
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (beinleiðis reytt), StÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 163 | 118 | 45 | 10 |
| 2 VB | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 138 | 23 | 10 |
| 3 Neistin | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 152 | 133 | 19 | 7 |
| 4 Tjaldur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 150 | 139 | 11 | 7 |
| 5 StÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 137 | 179 | -42 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 107 | 163 | -56 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 146 | 15 | 10 |
| 2 H71 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 159 | 140 | 19 | 8 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 182 | 171 | 11 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 146 | 141 | 5 | 7 |
| 5 KÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 136 | 158 | -22 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 139 | 167 | -28 | 1 |